# Verður bygd í Hoyvík

*- Ætlanin er framvegis at byggja eina ítróttahøll í Hoyvík, men tað verður ikki fyri handan prísin, sigur Kaj Leo Johannesen*



*Politiski viljin er at byggja eina høll í Hoyvík, men tað verður ikki fyri hasar pengarnar, sigur Kaj Leo Johannesen*

JÁKUP MØRK

Ætlanina um at byggja eina ítróttahøll við skúlan í Hoyvík fingu eitt álvarsligt skot fyri bógvin, tá tilboðini upp á arbeiðið vórðu latin upp her fyri.

**Nærum tvífaldað**

Framman undan hevði býráðið gjørt av, at seta 10,5 mió.kr. av til ætlanina, men tað tykist nú greitt, at hetta so langt ífrá verður nóg mikið.

Lægsta tilboðið var upp á góðar 18 mió.kr., og skal høllin byggjast fyri hesar pengar, er talan sostatt um nærum tvífaldaðan kostna.

Kaj Leo Johannesen, sum er formaður í mentamálanevndini hjá býráðnum sigur við Sosialin, tað kemur ikki upp á tal at byggja eina høll fyri hasara pengarnar.

- Tað eru settar 10,5 mió.kr. av til at gera arbeiðið, og endaliga loysnin skal finnast innan fyri hesar karmar, sigur Kaj Leo Johannesen.

- Talan er nú um eina nýggja støðu, og vit mugu tí finna útav, hvussu vit á besta hátt kunnu loysa hesa, sigur formaðurin í mentamálanevndini.

**Gundalur er klárur**

Tá ætlanin um ítróttahøll í Hoyvík varð samtykt av býráðnum, var ført fram, at ein onnur loysn kundi verið at broytt Gundadalshøllina til eina dupulthøll.

Nevnt varð tá, at Gundadalshøllin av fyrstan tíð varð roknað sum fyrsta byggistig í eini ætlan, sum í lidnum líki umfataði tvær hallir, og at alt jørðarbeiði v.m. varð gjørt soleiðis, at fyrireikingarnar til næsta byggistig at kalla eru lidnar.

Vagnur Michelsen, sum er formaður í nevndini fyri Gundadalshøllina, sigur við Sosialin, at teir framhaldandi meta, at besta loysnin er at byggja upp í Gundadalshøllina.

- Tilboð okkara til Býráðið stendur framvegis við, og vit eru sannførdir um, at hetta er skilabesta loysnin, Vagnur Michelsen. Hann leggur afturat, at ein høll í Hoyvík neyvan kann gerast bíligari enn tær 8-10 mió.kr., sum ein útbygging av Gundadalshøllini er mett at kosta.

- Her er alt jørðarbeiði gjørt, og grundøkið er planerað, so arbeiði kann eins væl byrja í morgin sum ein annan dag, sigur Vagnur.

Harumframt leggur hann dent á, at allur ítróttturin í høvuðsstaðnum frammanundan er savnaður í Gundadali, og at hetta tí eisini gevur aðrar fyrimunir.

- Eitt nú eru nógv, sum kanska fara beint av fótbóltsvøllinum at venja hondbólt, og harumframt vildi ein dupulthøll givið øktar møguleikar hjá skúlum, betri fortreyir fyri hondbótlsskúlum o.s.fr., sigur Vagnur.

**Politiskur vilji**

Spurdur um hetta svara Kaj Leo Johannesen, at tað er politiskur vilji fyri at leggja høllina í Hoyvík, og at talan tí helst verður um eina høll við skúlan, hóast ætlanin kanska verður onkursvegna skerd.

- Havnin og serliga Hoyvíkin veksa í dag við fullari ferð, og tí er eftir býráðsins fatan sera átrokandi at gera eina høll í Hoyvík. Eg eri tó fullvísur í, at tað innan heilt stutt áramál eisini verður neyðugt at útbyggja Gundadalshøllina, tí sum støðan er í dag, hava vetrarítróttinar alt ov fáar hallartímar.

Trupulleikin er, at Havnin so at siga veksur skjótari, enn vit kunnu útbyggja hana, og tí er alla tíðina neyðugt at raðfesta íløgur okkara, sigur Kaj Leo Johannesen, sum væntar, at Gundadalshøllin innan eini 5-10 ár er útbygd, soleiðis at talan tá er um eina sonevnda dupulthøll.

# Steypavinnarar

*Grundlógardagin vórðu tvær steypafinalur leiktar í yngru deildunum, og í báðum førum var talan um grannauppgerð millum havnarfeløgini bæði, HB og B36*

JÁKUP MØRK

Tað er ikki bara hjá vaksnu deildunum, at steypakapping verður skipað.

Eisini yngru deildirnar hava sítt at hugsa um í so máta, og grundlógardagin vórðu so tveir finaludystir á skránni.

**Vanlig leiktíð ikki nóg mikið**

Sum nevnt omanfyri, so var talan í báðum førum um dystir millum HB og B36, men hetta var ikki tað einasta, sum finalurnar høvdu til felags.

Mótstøðuliðini vóru nevnliga somikið jøvn, at tað í báðum førum varð neyðugt at fara út um vanligu leiktíðina, fyri at finna eina avgerð.

Fyrst leiktu smágentuliðini hjá báðum pørtum. Vanliga leiktíðin gav einki mál av sær, og tá umdysturin eisini endaði málleysur, varð neyðugt við brotssparkskapping, fyri at finna endaliga vinnaran.

Her gjørdist tað B36, sum dróg longra stráðið, og gjørdust tær sostatt steypavinnarar 2000.

**Í evstu løtu**

Hjá smádreingjunum gjørdist eisini neyðugt við longdari leiktíð, áðrenn ein vinnari varð funnin.

Leingi var annars líkt til, at B36 skuldi vinna rættin til steypið í eitt ár, tí fram til endan á dystinum vóru teir á odda 1-0. Tað eydnaðist tó HB leikarunum at javna í evstu løtu, og harvið máttu troyttu leikararnir út aftur á vøllin at spæla longda leiktíð.

Her vísti HB seg at vera stinnara liðið, og stutt fyri leiklok eydnaðist tað teimum at skora til endaliga úrslitið 2-1.

Við sigrinum tryggjaði HB sær ikki bara steypið í varveitslu komandi árið, men vunnu tað samstundis til ognar, ti HB nú hevur vunnið kappingina trý ár á rað



*Vinnarar av Cadburysteypinum, smadreingir: HB*



*vinnarar av Niels L. Arge steypinum, smágentur: B36*



Størstur í síni stødd – við størsta dieselmotori – til besta prísin

**ROYN HENDAN SERA VÆLUMTØKTA BILIN**

Størstur í síni stødd – við størsta dieselmotori – til besta prísin

**CARNIVAL**

**2.9 Dohc Turbo-Diesel**
**16 V, 126 HK, 5 hurðar**

Familju - camping - firmabilur- og "mini-bussur"



Fæst eisini sum vøruvognur



EINANS 197.800,-

*Multibilurin til einhvørja loysn*

Dupult airbag, ABS, servostýring, sentrallás, startsperra, elrútar í framhurðunum, el-hitað og -stýrd síðuspegl, miðsetur, sum kunnu vendast og flytast aftur og fram við borðum, koyrisetrið kann setast í 8 ymiskar støður, rattið kann flytast upp og niður, nakkastuðlar, sum kunnu stillast og takast burtur, lesiljós framman, kúfangarar í sama liti sum bilurin, skinnarar á takinum v.m.

***3 ára garanti/100.000 km. garanti***



EINANS 235.800,-

Rætti bilurin til mong endamál. –Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri. Fæst eisini við aut. gearum.

Sosialurin - 311820

D. B. Bilar J. Broncksgøta 15 • FO-110 Tórshavn Tlf. 310600

**Starvsfólk til goymsluna**

**Goymslan**

Søkt verður eftir einum starvsfólki til goymslu okkara á Hálsi í Tórshavn at byrja 1. august ella skjótast møguligt.

Á goymsluni starvast 6 fólk og høvuðsuppgávurnar eru: vørumóttøka, skráseting, prísjavnan, tollavgreiðsla, frakt og vøruútflýggjan og annars alt vanligt goymsluarbeiði.

Tann, sum settur verður, skal fyrst og fremst fáast við toll- og fraktavgreiðslu, men má eisini rokna við at skula taka sær av øðrum uppgávum á goymsluni.

**Tín førleiki:**
Tú skal hava útbúgving sum goymslufólk, skrivstovufólk ella hava royndir í arbeiði við toll og frakt. Dentur verður lagdur á, at tann sum settur verður, kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Eisini er fyrimunur um tú hevur**
- royndir við edv (á brúkarastøði)
- góðan røkjuskap
- góð samstarvsevni

Kunnleiki til enskt er ein fortreyt.

Lønin verður sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Tele.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran á Goymsluni, Heina Mikkelsen á tlf. 303030 lok. 3224.

Umsóknir við hjáløgdum prógvum og CV skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 21. juni 2000 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697

SANSIR · TEL 355 355

**Eydnuhjól**

Haldórsvíkar Avhaldsfelag hevur eydnuhjól v/ matsølu og fiskibrunni 2. hvítusunnudag kl. 16.00.

Nógv gott verður at vinna, m.a. Lomb – Dúkar – Dukkur – Bilar – Fjallstavar – Keypmansdiskar – Pyntihandklæði v/ hillum og mangt annað.

***Vælkomin til eydnuhjól!***

**Nevndin**

**Summarfrí**

Stongt verður vegna summarfrí frá 30.6. til 24.7.

*Hjá Unn*
*Tlf. 421537*
*416 Signabøur*

**Søkt verður eftir**

**Lærarum til Eiðis Skúla skúlaárið 2000/2001**

Talan er um tvey fulltíðarstørv og eitt við uml. 10 tímum.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meira kann fáast at vita um størvini við at venda sær til fyrstalæraran á tel. 42 35 79 ella 44 33 31.

Eiðis skúli hevur undirvísing 1.–7. árgangi. Komandi skúlaár verða 9 lærarar og 98 næmingar í Eiðis skúla.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera Eiðis skúlanevnd í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. juni 2000.

**Eiðis skúlanevnd**
v/ Dortheu K. Sørensen
470 Eiði

